UTTAN ÚR HEIMI

## Leggur frá sær

Amerikanski ráðharin í trygdarmálum, Tom Ridge, hevur kunngjørt, at hann leggur frá sær. Almenna grundgeving hansara er, at hann hevur havt ov lítla tíð til síni næstu, síðani hann gjørdist ráðharri.

Tom Ridge er fyrrverandi guvernørur í statinum Pennsylvania. Aftan á atsóknirnar at New York og Washington tann 11. september í 2001 gjørdi George W. Bush, forseti, av at skipa eina ráðstovu, sum skuldi hava ábyrgdina trygdini í landinum, og seinastu árini hevur Tom Ridge staðið á odda fyri hesari ráðstovuni.

Tom Ridge er tann sjeyndi ráðharrin, sum fer úr stjórnini hjá Bush síðani forsetavalið 2. november.

## Val í úrtíð

Tað hevur prutlað undir tí politiska lokinum í Portugal teir seinastu mánaðarnar, og nú hevur forsetin gjørt bart. Hann hevur sent tjóðartingið til hús og boðað frá nývali.

Fyri fýra mánaðum síðani tók Santana Lopez við sum forsætisráðharri, eftir at Jose Manuel Barroso hevði tikið av tilboðnum um at gerast formaður í ES-nevndini. Men stjórnarleiðaraskiftið vísti seg at vera óheppið.

Síðani Lopez tók við, hava flokkarnir í stjórnarsamgonguni keglast um fleiri mál, og teir hava havt ilt við at semjast um ymisk mál, eitt nú fíggjarlógina fyri 2005. Eitt nú vilja partar av samgonguni geva fólki skattalætta, meðan onnur halda tað vera púra burturvið. Tey vísa á, at landið hevur verið í álvarssomum politiskum trupulleikum, og at teir mugu fáast av vegnum, áðrenn skattalættar kunnu koma upp á tal.

Í seinastuni hava ráðharrar lagt hvør annan undir bæði líkt og ólíkt, og tað fekk bikarið at flóta yvir. Slíkt vil forsetin ikki góðtaka, og tí hevur hann boðað frá nývali, skrivar Reuters.

## Ferðin sett niður

Nýggj tøl hjá donsku ferðslumyndugleiknum vísa, at danskir bilførarar koyra ikki so skjótt longur

Fyrr í ár fingu danir loyvi at koyra 130 kilometrar um tíman á summum vegateinum, og tølini vísa, at tað hevur eftir øllum at døma gjørt, at nú eru tað færri, sum koyra við ímillum 140 og 180 kilometra ferð, skrivar Politiken. Verður hugt at teinunum, har hámarksferðin er 110 kilometrar um tíman,. eru brotini á hámarksferðina minkað meiri enn 60 prosent samanborið við í fjør.

Danska løgreglan hevur gjørt serliga nógvar ferðkanningar í ár, og tað hevur eisini givið úrslit. Higartil í ár hava 18.000 fólk fingið bót fyri at koyra ov skjótt, og tað er tvær ferðir so nógv sum undanfarin ár. Løgreglan sigur, at átakið ímóti teimum, sum koyra ov skjótt, heldur fram næsta ár.

## Vilja hava generalin

Fleiri ES-lond hava gjørt greitt, at Kroatia fær ikki limaskap í samveldinum, fyrr enn landið útflýggjar generalin Ante Gotovina, sum er ákærdur fyri krígsbrotsverk í borgarakrígnum á Balkan í nítiárunum.

Ante Gotovina stóð á odda fyri einum blóðugum kroatiskum álopi á serbarnar í landspartinum Krajina í august í 1995. Minst 150 fólk doyðu, fleiri hundrað hvurvu, og næstan 200.000 vórðu rikin frá húsi og heimi. Altjóða krígsbrotsmannadómstólurin í Haag hevur fleiri ferðir biðið kroatisku myndugleikarnar útflýggja generalin, men higartil uttan úrslit.

Nú vil ES ikki bíða longur. Á toppfundinum, sum samveldið fer at halda um fjúrtan dagar, verður málið um generalin tikið upp, og tá fær kroatiska stjórnin væntandi at vita, at landið fær ikki limaskap, fyrr enn Ante Gotovina er latin dómstólinum í Haag.



*"Estonia" sakk 28. september í 1994 á veg úr Estlandi til Svøríkis. Vanlukkan kravdi 852 mannalív*

# "Estonia" var smuglaraskip

**Í minst tveimum førum smuglaði svenska verjan russisk vápn úr Estlandi til Svøríkis við ferjuni "Estoniu" - eisini í september í 1994, tá ferjan sakk**

SMUGLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Líka síðani "Estonia" sakk í Eystrasalti tann 28. september í 1994 hava gitingar verið um, hví ferjan sakk, og tey flestu eru á einum máli um, at tann almenna frágreiðingin, sum kom nakað seinni, svaraði ikki øllum spurningunum.

Fyrrakvøldið hevði svenska sjónvarpið eina sending um vanlukkuna, og har kom fram, at svenska fregnartænastan smuglaði framkomin russisk vápn úr Estlandi og hinum baltisku londunum við "Estoniu".

Tað finnast eingi prógv fyri, at russisk hernaðarútgerð var umborð á ferjuni vanlukkunáttina, men tann sannroynd, at alt er kki komið fram, er nóg mikið til at kanna vanlukkuna umaftur, sigur Lars Borgnæs, sum hevur gjørt sendingina.

– Tað minsta kravið má vera, at kavarar fara niður at kanna dekkið á ferjuni fyri at vita, hvat var í lastbilunum. So vítt vit vita, hava eingir kavarar verið har, og tí vita vit ikki, hvat var í lastbilunum, sigur Lars Borgnæs.

Í sendingini brúkti hann upplýsingar frá fyrrverandi tollstjóranum í havnini í Stockholm, Lennart Henriksson, og har kom fram, at hann hevði ikki sagt alt, sum hann visti, tá málið bleiv kannað.

### Uttan um tollin

Í sendingini greiddi Lennart Henriksson frá, at í september í 1994 fekk hann at vita frá einum stjóra í svenska tollverkinum, at tollararnir í havnini í Stockholm skuldu ikki kanna ein ávísan bil, sum kom við "Estoniu" tann 14. september. Hann gjørdi, sum honum var álagt, men helt kortini eygað við bilinum, tá hann kom í land. Tað vísti seg at vera ein Volvo 745. Í bilinum vóru nakrir kassar, og Henriksson skilti, at hetta vóru kassar við onkrari herútgerð. Tá hann seinni kannaði, hvør átti bilin, vísti tað seg, at hetta var ein bilur hjá tøknifyritøkuni Ericsson.

Í sendingini greiddi Lennart Henriksson frá, at seks dagar seinni, tann 20. september, fekk hann aftur boð um at lata ein ávísan bil sleppa ígjøgnum tollin uttan kanning. Hetta var ein vøruvognur.

Stjórin hjá Lennart Henriksson váttaði í sjónvarpssendingini, at tað hendi av og á, at bilar við loyniligum farmi komu við "Estoniu", og at boðini um at lata bilarnar sleppa ígjøgnum tollin komu frá verjuni. Men hetta dugdu hvørki táverandi aðalstjórin í tollverkinum ella táverandi verjuovastin at minnast. Heldur ikki ovastin í hernaðarligu fregnartænastuni sigur seg minnast hetta, men hann vildi ikki taka lut í sendingini.

– Av tí at málið snýr seg um loyndarmál hjá verjuni kann eingin siga nakað, sjálvt um teir minnast tað, sigur táverandi verjuovastin, Erik Rossander, við svenska sjónvarpið.

### Kannast umaftur

Táverandi verjuovastin í Estlandi, Alexander Einseln, hevur einki ímóti at siga sína hugsan. Við svenska sjónvarpið sigur hann, at upplýsingarnar um vápnasmuglingina eru av slíkum slagi, at málið eigur at verða kannað. Men tað skulu vera óheft fólk, sum gera kanningina, og tey kunnu tí ikki vera úr Estlandi, Svøríki, Finnlandi ella Týsklandi, sigur hann.

– Fólk hava krav uppá at fáa at vita, hvat hendi, og hví tað hendi, sigur Alexander Einseln og leggur afturat, at vóru loynilig vápn umborð á "Estoniu", kann tað vera orsøkin til, at myndugleikarnir vóru so skjótir at leggja lok á vanlukkumálið, sum hann tekur til.